Skála-TB 8-0 (3-0):

# TB flytur niður eftir stórtap

**Við størsta sigrinum í 1. deild í ár, sendi Skála TB niður í 2. deild. Dysturin var longu avgjørdur í hálvleikinum tá Skála var á odda 3-0**

FÓTBÓLTUR
*Bjartur Nolsøe*

Tað stóð nógv uppá spæl tá Skála og TB hittust á Skála sunnudagin. Tapandi liðið vildi næstan við vissu flyta beinleiðis niður í 2. deild. Tí bleiv byrjanin eisini varðlig, har liðini í hvør sínum lagi royndu at verja tað tey høvdu tá dysturin byrjaði.

### Jøvn byrjan

Nógv vatn var á vøllinum og hetta gjørdi at umstøðurnar ikki vóru alt ov góðar. Javnt gekk á fyrstu løtuna og ongin stórur møguleiki var til nakran partin.

Men so hvørt sum fyrri hálvleikur leið, fingu liðini vant seg við umstøðurnar og meiri flótandi spæl var at siggja. Og tað vóru skálamenn sum fyrst komu fyri seg og við ágrýtnum spæli fingu lagt tryst á TB.Tá okkurt um 20 minuttir vóru farnir fingu teir fyrsta málið, sum Lars Muller í TB-málinum má taka uppá sín rygg. Hann spældi bóltin beint út til Jónhard Frederiksberg, sum hegnisliga lyfti bóltin uppum Lars og í mál.

Eina løtu seinni kundu tvøramenn javna, tá Vladimir Matijivic skallaði á tvørstongina eftir at eitt fríspark kom væl innfyri. Hetta var tað nærmasta TB kom einum máli í fyrra hálvleiki, og eftir hetta sat Skála á dystinum.

Tá 5 minuttir eru eftir til hálvleik fekk Skála fríspark beint uttanfyri brotsteigin hjá TB. Skotið var hart og á váta vøllinum megnaði málmaðurin hjá TB ikki at halda bóltinum, sum kom út aftur til Alexandru Gabor sum setti hann í mál.

Og løtu seinni fór Jónhard Frederiksberg enn einaferð ígjøgnum verjuna hjá TB og skeyt móti málinum. Lars Muller bjargaði í fyrstu syftu, men Hanus Thorleifsson fylgdi upp og skoraði til 3-0.

*Eftir 14 dystir uttan sigur, hevur Skála nú vunnið tveir av trimum dystum, og fagnaðurin var stórur, tá teir hølvaðu tvøramenn av í avgerandi dystinum*

### Avgjørt í hálvleikinum

Nú var dysturin í roynd og veru avgjørdur, tí ilt var at síggja hvussu TB kundi gera nakað sum helst við tryggu Skála-leiðsluna.

Tann lítla vónin sum tvøramenn høvdu til seinna hálvleik, brast bert 2 minuttir eftir at seinni hálvleikur var bríkslaður í gongd. Alexandru Gabor samstundis sum skálamenn fóru at hugsa um at verja leiðsluna.

Hóast leikferðin minkaði næstu løtuna, vóru nógvir møguleikar og Skála hevði nógv teir flestu. Jónhard Frederiksberg fekk miðskeiðis í seinna hálvleiki tvær ferðir bóltin í netið, so nógv og liðini høvdu sligið seg til tols við at dysturin fór at enda við teimum 6-0. Men í yvirtíðini gjørdi Skála bart einaferð enn, og skoraði tvey skjót mál so endaliga úrslitið gjørdist heili 8-0 til Skála.

Fyrst var tað Áki Petersen, sum við einum góðum skallamálskjótingini setti Arnhold Berg við seinasta málinum.

Skála vann sostatt stórsigur á einum TB-liði, sum bert var við í dystinum fyrstu løtuna. Tapið viðførir, at TB skal spæla í 2. deild næsta ár, eftir bert eitt ár í 1. deild á hesum sinni.

### Dysturin í tølum

**Skála-TB 8-0(3-0)**
1-0: Jónhard Frederiksberg
2-0: Alexandru Gabor
3-0: Hanus Thorleifsson
4-0: Alexandru Gabor
5-0: Jónhard Frederiksberg
6-0: Jónhard Frederiksberg
7-0: Áki Petersen
8-0: Arnhold Berg
Dómari: Lassin Isaksen

Skála: Eugen Voda - Pauli Pouslen, Rúni Rasmussen, Bent Djurhuus, Kári Nielsen, Hanus Thorleifsson, Jonhard Frederiksberg, Gheorghe Callo, Áki Petersen, Pauli Hansen, Alexandru Gabor
TB: Lars Müller - Óli Johannesen, Milan Cimburovic, Nebosja Urtajl, Vladimir Matijivic, Kaj Roest, Olivur Abrahamsen, Dan Mortensen, Bárður Dimon, Allan Michelsen, Aleksandar Radosavljevic

ÍF-FSV 1-0 (0-0):

# Fuglfirðingar vóru vónbrotnir

**ÍF gjørdi væl og virðiliga sítt á heimavøllinum, har gullvinnararnir ikki megnaðu at sannføra, at teir hoyra heima í bestu deildini**

2. DEILD
ÍF-FS VÁGAR
*Jóannes Hansen*

Líkindini vóru fín, og hýrurin á áskoðarunum var góður í Fuglafirði. FSV, sum tey í Vágum kalla felagsliðið, hevði fitt av heimafylgi við sær. Tey vildu vera eygnavitni til átjanda landskappingardystin í 2. deild á hesum sinni og til, at sjónligu prógvini fyri uppflytingina – steypið og gullkrónurnar – vóru handað.

Avrikið hjá FSV í Fuglafirði var ikki gott. Hugburðurin var rættuliga hálvhjartaður, og longu í 8. minutti tóktist uppleggið at fara í fisk. Fullkomuliga høvuðleyst átók Bjarni Prior sær uppgávuna at sekta frísparksmistak hjá mótstøðumanni, og so var einki annað at gera hjá Niklasi á Líðarenda enn at vísa honum reyða kortið.

ÍF var yvirmannað í ein stóran hálvan tíma. So fekk Høgni á Lakjuni hjá ÍF reyða kortið. Støðan sá ikki serliga ógvuslig út. Høgni elti langa sending inn um miðverjuna hjá FSV. Verjumaðurin hevði armin uppi, ælbogin kom í bringuna á IF spælaranum, sum var eitt sindur harmur og legði armin um hálsin á mótstøðumanninum, tá teir vóru á veg aftur úr brotsteiginum.

Tað eigur ein fótbóltsspælari ikki at gera. Men dómurin luktaði ikki frítt av kompensatión.

Í 2. hálvleiki var ÍF greitt omaná, tá liðini spældu tíggju ímóti tíggju. Hanus Eliasen og Høgni Zachariasen vóru fínir á miðvøllinum. Teir megnaðu at varðveita bóltin, tá tað var neyðugt, teir dugdu at senda í borðini, og teir vunnu flestu longu og høgu sendingarnar, sum komu fram á vøllin.



*Fuglfirðingar vunnu seinasta dystin á árinum móti oddaliðnum úr Vágunum, men hetta rakk kortini ikki til dyst um uppflyting*

Mynd: Jonhard Hammer

Tað vóru fleiri ábendingar um, at ÍF fór at fáa mál, og at enda eydnaðist tað. Høgni Zachariasen og Hanus Eliasen stóðu fyri uppspælinum, og bródliga varð Rúni Petersen púra leysur innanfyri FSV miðverjuna og mitt fyri. Málverjin kendi seg noyddan at leypa út, og Rúni lobbaði sera hegnisliga og í besta Preben Elkjær stíli upp um málverjan og í málið.

Sum 2. hálvleikur leið datt ÍF alt longri aftur. FSV flutti fólkið fram, og onkra ferðina var tætt við. Besta møguleikan fingu teir, tá miðverjin Jákup Joensen, sum var sera álopshugaður, streyk ígjøgnum í høgru og sendi flatt til nærra stólpa. har kom John Johansen akandi, men bólturin fór dygst uttanfyri handara stólpan.

### Vitstu einki

Tá dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð, var tað greitt, at FSV hevði vunnið gull, og at teir skuldu flyta upp í bestu deildina.

Stóri spurningurin var, hvussu tað hevði hilnast hjá ÍF, sum í striðnum um næsrtfremsta plássið undan dystinum var aftanfyri B71.

Á beinkinum vóru teir alla tíðina greiðir yvir, at B71 var frammanfyri á Sandi ímóti VB.

So var spurningurin, um ÍF skuldi fáa bronsumerkini ella ikki. Teir fingu bronsuna, tí B36 ikki megnaði at vinna á heimavølli. Men tað tóktist ikki sum um at ÍF spælararnir fróddust serliga nógv um bronsumerkini. Teir vildu heldur havt fingið loyvi at spæla um eitt pláss í 1. deild!

FSF formaðurin, Dánial Andreasen, handaði steypið. Hann vónaði, at tað fór at gangast FSV so mikið væl, at teir ikki aftur nógvu tey fyrstu árini fóru at hava møguleika fyri at finna steypið í 2. deild!

### Dysturin í tølum

**ÍF-FSV 1-0 (0-0)**
1-0: Rúni Petersen



KÍ-HB 2-1 (0-0):

# KÍ sendi HB niður

**Fyri fyrstu ferð í tíggju ár misti HB umboðanina í aðru deild. Staðfestingin var í Klaksvík, har HB skuldi vinna, um sessurin skuldi varðveitast**

2. DEILD, MENN
*Hilmar Jan Hansen*

Dysturin í Klaksvík leygardagin var síðsta útkall hjá HB, skuldi liðið megna at verða verandi í 2. deild, meðan KÍ kundi standa seg við javnleiki.

Hetta sást eisini aftur, tí hóast tann heilt stóri munurin kanska ikki var á liðunum, var HB klárt tað liðið, ið hevði meira at spæla fyri og eisini royndi at spæla fyri sínum møguleika.

Tá so KÍ tveir minuttir inn í seinna hálvleik fekk ein mann útvístan — hann var forrestin komin inn beint frammanundan — øktist trýstið á KÍ í stórum, so klaksvíkingar fyri tað mesta høvdu úr at gera við at verja.

Tí kom tað eisini sum ein vátur vøttur frammaná hjá HB, at KÍ legði seg á odda 1-0, tá bara eitt korter var eftir. Ein KÍ-royndi móti málinum endaði við, at bólturin stakk upp í loft. Har gjørdist Olgar Danielsen hægsti maður, skallaði á stongina — og fekk so í aðru atløgu bóltin beint í andlitið, og stýrdi honum á tann hátt í málið!

Góðar tíggju minuttir seinni miseydnaðist ein rangstøðufella hjá HB, og tað endaði við, at John Ryan slapp púra leysur móti HB-málinum og sendi bóltin inn undir málverjan í málið til 2-0.

Sjálvt um HB ein minutt seinni svaraði aftur, tá Ransin Djurhuus útnyttaði eina misskiljing í KÍ-verjuni og fekk prikað bóltin í málið, gjørdist tað ov seint at venda dystinum, og KÍ vann 2-1.

KÍ, sum í endaspurtinum vann seg upp á fjórða plássið, sendi við hesum HB niður í 3. deild. Men sum prátið hevur gingið um vikuskiftið, skuldi tað verið uppaftur verri enn so, tí HB frammanundan hevði tikið sítt 3. deildarlið úr kappingini, tá trý umfør vóru eftir.

Av tí sama hava fleiri róð framundir, at bæði liðini hjá HB skuldu heilt niður í 4. deild, men so verður kortini ikki. Reglurnar á tí økinum eru greiðar, og talan verður vanliga niðurflyting hjá bæði 2. og 3. deildarliðnum hjá HB.

*HB tapti seinasta dystin á árinum, og hetta merkti niðurflyting hjá meistarafelagnum*

Mynd: SáH

Tað hevði kanska eisini verið mestsum ov mikið av tí góða, um nýklaktu føroyameistararnir í mansfótbólti í næsta ár skuldu farið heilt niður í 4. deild eftir fólki at manna bonkin í 1. deild.

### Dysturin í tølum

**KÍ-HB 2-1 (0-0)**
1-0: Olgar Danielsen
2-0: John Ryan
2-1: Ransins N. Djurhuus

VB–KÍ 2-1 (0-0):

# VB tók luftina úr KÍ

**Undan lotinum fekk VB einki mál, men við væl upplagda Jón Paula Olsen sum uppleggjara megnaðu vágbingar í 2. hálvleiki at skora tvær ferðir og harvið syrgja fyri, at KÍ tapti fyri fyrstu ferð síðani í 4. umfari**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Jón Pauli Olsen hjá VB hevur boðað frá, at hann ætlar sær ikki at spæla í 1. deild komandi ár. Onkur annar VB spælari hevur tosað um hetta sama, men nú fáa vit at siggja. Uttan mun til hvussu hugburðurin verður, tá januar mánaði verður hálvur, so ber til at sláa fast, at vágbingar sunnudagin søgdu farvæl við heimaáskoðararnar á hesum sinni við maner.

KÍ hevði ikki tapt í tólv dystum á rað, tá teir komu til Vágs at striðast fyri at varðveita FM møguleikan. Men so steðgaði VB teimum.

Vágbingar høvdu lotið undan í 1. hálvleiki. Málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir, Bjarni Johansen og Meinhardt Joensen høvdu ikki so nógv at takast við, og tað vórðu ikki skorað mál.

Eftir steðgin kom vend í.

*Fyri fyrstu ferð í 13 dystir mátti KÍ taka til takkar við tapi, tá VB við einum væl uppløgdum Jón Paula Olsen á odda megnaði at venda 0-1 til 2-1*

Mynd: Áki Bertholdsen

Alt tóktist ganga, sum tað kundi roknast við, tá KÍ kom á odda. Atli Danielsen, sum var ytstur í høgru av teimum fýra í aftastu KÍ ketuni, legði diagonalbólt inn um VB verjuna, Slobodan Madzar var ikki nóg ansin, Heðin á Lakjuni fekk tak á, smekkaði úr spískum ímóti málinum, og Bjarni Johansen megnaði ikki meiri enn at sláa bóltin í stólpan, og so var KÍ frammanfyri.

Á Svangaskarði næstsíðsta sunnudag tóktist tað, sum um VB eftir steðgin var farið púrasta í vetrarfrí. Tað vóru vágbingar ikki á heimavøllinum sunnudagin. Teir smoygdu seg í stríðshamin, og tað eydnaðist teimum at skora tvey mál og harvið at vinna øll stigini.

### Jón Pauli væl við

Marek hevði ímóti gomlu liðfeløgunum í KÍ sett Palla Augustinussen við síðuna av sær sjálvum á sentrala miðvøllinum. Mortan úr Hørg var ytstur í høgru, og í fremstu rað vóru Jón Pauli Olsen og so Robert Cieslewicz. Pólverjin spældi ikki nakað serligt fyrsta mánaðin eftir summarsteðgin. Tað var orsaka av heilsuávum. Síðani er Robert so spakuliga komin fyri seg. Hann hevur vant eitt sindur og spælt á 2. deildarliðnum, og sunnudagin var hann fyri fyrstu ferð aftur á besta liðnum.

Jón Pauli Olsen var við í bæði útjavnandi málinum, og tá VB skoraði sigursmálið. Í fyrra førinum varð frísparksbóltur lyftur fram í høgru. Jón Pauli Olsen fekk tak á, og hóast tveir verjuspælarar vóru kring hann, so eydnaðist honum at leggja innfyri. Bólturin fór ímillum beinini á KÍ verjuspælara, og Robert Cieslewicz var rættuliga leysur, tá hann skoraði.

Mortan úr Hørg skoraði sigursmálið. Jón Pauli Olsen legði upp á tvørs, og við nógvari ferð og ikki serliga stórum skotvinkli megnaði Mortan úr Hørg at senda millum beinini á málverjanum, og so var VB á odda.

### Skiftingarnar hjálptu ikki

Í fleiri av undanfarnu dystunum hevur tað koppað KÍ til fyrimunar, tá Kurt Mørkøre hevur skift fólk. Aftur hesa ferð vórðu útskiftingarnar triggjar, men tað hepnaðist ikki. Harley Bertholdsen kom fyrst inn fyri Bjarta Vattelstad, sum aftur hevði fingið annað plássið í álopinum. So loysti Erling Fles Allan Mørkøre av, og síðstu løtuna var Kurt Mørkøre á vøllinum. Hann kom inn fyri vongverjan í vinstru Rúna Elttør. Tá spenti KÍ álopsbogan. Teir høvdu síðstu løtuna Alexander Djordjevic í álopinum, men Bjarni Johansen var tættur sum fløskan.

Vágbingar røkka ikki heiðursmerkjum, og teir flyta ikki niður. KÍ hevur framvegis silvurmerkini at striðast fyri. Teir fara leygardagin sjálvir at vera við til at gera av, um krónurnar skulu verða úr silvuri ella bronsu.

### Dysturin í tølum

**VB-KÍ 2-1 (0-0)**
0-1: Heðin á Lakjuni 50
1-1: Robert Cieslewicz 55
2-1: Mortan úr Hørg 82
Dómari: Oddmar Andreasen

VB: Bjarni Johansen – Slobodan Madzar, Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Mortan úr Hørg, Palli Augustinussen, Marek Vierzbizcki, Nenad Zivanovic – Robert Cieslewicz, Jón Pauli Olsen
KÍ: Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Alexander Djordjevic, Símun Joensen, Rúni Elttør – Allan Mørkøre, Hjalgrím Elttør, Allan Joensen, Jan Joensen – Bjarti Vettelstad, Heðin á Lakjuni